M
E
N
T
A
M
Á
L
A
R
Á
Ð
I
Ð

# FÓLKASKÚLIN

# GREIÐSLUROKNING
# 9. FLOKKUR

Fríggjadagur 29. mai 2015
kl. 08.15 – 12.15



*Mynd: Gulakur Zachariasen*

**Næmingurin kann hava uppgávuarkið alla tíðina**

## 1 Handilsstykki

35 føroyingar fóru á sumri í 2014 at súkkla úr Danmark til París. Endamálið við túrinum var at savna pengar til børn, ið hava krabbamein og familjur teirra.

Áðrenn tey fóru avstað, skuldu tey keypa ymsa útgerð, ferðaseðlar o.a.



| | |
|---|---|
| Rynkeby-súkkla og rynkeby-klæði | 11.150,- |
| Hotel | 5.000,- |
| Norrøna, flogferðaseðil o.a. | 5.664,- |
| Eyka útgerð (brillur, skógvar o.a.) | 3.000,- |

a) Hvussu nógv skuldi hvør luttakari gjalda?

Rætti prísurin á súkkluni var 12.000 kr, men av tí at tey keyptu nógvar súkklur, kostaði hon bara 7000 kr.

b) Hvussu nógvar krónur fingu tey í avsláttri fyri hvørja súkklu?

c) Hvussu nógv % var avslátturin?

Á klæðunum vóru lýsingar. Hvør lýsing kostaði 20.000 kr. Á klæðunum vóru 42 lýsingar.

d) Hvussu nógvan pening fingu tey fyri lýsingarnar á klæðunum?

Tá ið túrurin var liðugur, vóru 970.000 kr. savnaðir inn til Krabbameinsfelagið.

e) Hvussu stórur %-partur av pengunum, ið vóru savnaðir inn, vóru pengar frá lýsingunum á klæðunum?

## 2 Evnisnøgd og geometri

Súkklan er stoypt úr aluminium og stellið vigar 4,3 kg.

Aluminum hevur evnisvektina 2,7 g/$cm^3$.

a) Hvussu nógvir $cm^3$ av aluminium eru brúktir til stellið?

Um stellið var gjørt úr jarni, hevði tað havt aðra vekt.

b) Hvussu nógv hevði tað vigað?

Hjólið á súkklunum er sum á myndini.




c) Rokna ummálið á hjólinum.
d) Hvussu nógvir snúningar skulu til 1 km?

## 3 Hagfrøði

Líka síðan Ólavur fekk boðini um, at hann var sloppin við á Rynkeby-liðið, hevur hann vant nógv og miðvíst. Í tíðføristalvuni niðanfyri sært tú, hvussu nógvar venjingar hava verið í hvørjum mánaði.

a) Tekna talvu, sum hana niðanfyri og rokna virðini í teigunum.

| Tíðføristalva | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Eygbering X** | **Tíðføri t(x)** | **Samantalt Tíðføri T(x)** | **Tídd f(x)** | **Samamtald Tídd F(x)** |
| August | 4 | 4 | 4,17 % | |
| September | 9 | 13 | 9,38 % | |
| Oktober | 8 | 21 | | |
| November | 7 | | | |
| Desember | 6 | | | |
| Januar | 9 | | | |
| Februar | 12 | | | |
| Marts | 9 | | | |
| Apríl | 6 | | | |
| Mai | 12 | | | |
| Juni | 10 | | | |
| Juli | 4 | | | |
| Til samans | | | | |

b) Rokna, hvussu nógv Ólavur vandi í miðal um mánaðin?
c) Tekna eina rimamynd, ið vísir tíðførið.
d) Tekna eina farmynd, ið vísir samantaldu tíddina.

## 4 Tíð, ferð og strekki

Á einum venjingartúri súkklar Ólavur norður til Gjáar. Av Gjáarskarði og oman í bygdina eru 3 km. Hann brúkar 2 minuttir og 58 sekund um hetta strekkið.

a) Rokna miðalferðina hjá honum av Gjáarskarði og oman í bygdina.

Súkklararnir fara úr Føroyum til Danmarkar við Norrønu. Norrøna siglir við miðalferðini 21 sjómíl um tíman.

b) Rokna miðalferðina hjá Norrønu í km/t.

1 sjómíl = 1,852 km

Við somu miðalferð hevur Norrøna 36 tímar um túrin til Danmarkar.

c) Rokna longdina á leiðini hjá Norrønu til Danmarkar

Á ferðini úr Føroyum til París súkklaði hvør luttakari á Rynkeby-liðnum til samans 1233 km. Tey brúktu til samans 58 tímar og 12 minuttir um ferðina.

d) Rokna miðalferðina í km/t hjá hvørjum luttakara úr Føroyum til París.

## 5 Eiffeltornið

Tey steðga í París nakrar dagar, eftir at tey eru komin til býin. Tey vitja Eiffeltornið!

a) Rokna vinkul A.
b) Rokna hæddina á Eiffeltorninum.
c) Rokna víddina á tríkantnum ABC.
d) Rokna longdina á linjuni AB.




## 6 Gjaldoyra

Í Paris fóru tey at vitja tað víðakenda Eiffeltornið. Tað kostaði 15 evrur fyri hvønn.

a) Hvussu nógvar krónur kostaði vitjanin fyri hvønn?

**Kursur**

Evrur = 744,30

Um tey keyptu eitt atgongumerki, har tey sluppu undan bíðirøðini, kostaði tað 355 kr.

b) Hvussu nógvar evrur eru tað?

Paris Vision

## 7 Líkningar

a) Ritloys líkningaheildina: $y = 2x + 3$ og $-x + y - 6 = 0$

b) Loys líkningina: $\frac{5x}{2} - 7 = 3$